# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Hátíðarhald á Landssjúkrahúsinum

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Marius Rasmussen, yvirlækni á Røntendeildini, sonurin Rógvi Rasmussen og Anders Harboe Ree yvirlækni*

Hátíðarhald var á Landssjúkrahúsinum mánadagin 1. februar í sambandi við at 50 ár eru liðin síðan røntgendeildin gjørdist sjálvstøðug deild, og Landssjúkrahúsið varð býtt upp í økir, og yvirlækni varð settur í starv á medisinsku deild.

Mánadagin 1. februar vóru 50 ár liðin síðan røntgendeildin á Landssjúkrahúsinum gjørdist sjálvstøðug deild, og Sanna Dahl Niclasen varð sett sum yvirlækni á deildini. Frammanundan var táverandi Dr. Alexandrines Hospitali skipað sum ein og sama deild. Í samband við at Sjúkrasystraskúli Føroya varð settur á stovn, varð ein treyt at hesin varð knýttur at einum sjúkrahúsi við trimum sergreinum, og tá varð sjúkrahúsið býtt sundur í skurðdeild, medisinska deild og røntgendeild.

Røntgendeildin hevur verið í støðugari menning øll hesi árini. Fyri skjótt fýra árum síðani varð alt røntgenvirksemið talgildað, og við hesum eru røntgendeildirnar á teimum trimum sjúkrahúsunum knýttar saman í eina eind.

Hátíðarhildið var eisini at 50 ár eru liðin síðan Landssjúkrahúsið varð býtt upp í fleiri økir, og danin Bent Jensen yvirlækni varð settur í starv á medisinsku deild.

Í dag eru á Landssjúkrahúsinum fimm økisdeplar. Hesir eru skurð-, medisinski-, psykiatriski-, bráð- og ein diagnostiskur depil. Allir deplarnir hava egna depilsleiðslu við egnari fyrisiting og ábyrgd fyri fíggjarviðurskiftum. Harumframt er ein Tænastudepil við einum leiðara. Leiðslurnar á deplunum hava beinleiðis tilvísing til ovastu stjórnina á Landssjúkrahúsinum.

Í sambandi við hátíðarhaldið helt Jón á Steig yvirlækni eina røðu um 50 ára søguna hjá deildunum.

*-red*



*Sanna Dahl Niclasen, fyrrverandi yvirlækni á Røntgendeildini, og sonurin Jógvan, sum eisini er lækni*







*Bæði núverandi og fyrrverandi starvsfólk vóru til hátíðarhaldið, har Jón á Steig yvirlækni hevði hildið røðu*

# Tøkk



Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð okkara elskaðu dóttur

**Ró Joensen**

Tøkk fyri heilsarnir, uppringar, teldupostar, vitjanir og forbønir.
Takk fyri gávur til Zarepta og Leguhúsið í Nesvík.

*Heilsan*

**Margret og Johan David, Johnvá og Sjúrður**
**Gertrud og Kalli, Allan, Flóvin og Dagfinn**